

# Havnin full av sild

Ta seinastu tíðina hevur óvanliga nógv sild verið rundan um Vestmannaoyggjarnar, og í gjár skrivaðu bløðini, at nú var so nógv sild komin inn í sjálva havnina, at hon var at kalla full av sild. Hetta sama fyribrigdið var um ársskiftið, men sambært Morgunblaðnum stendur sildin tættari í havnini nú enn tá. Fólk í Oyggjunum greiða frá, at sjógvurin inni í havnini er silvurlittur av sildini, og at tað hendir meiri enn so, at tað kókar úti fyri havnarlagnum.

# Starvsfólk skulu vera errin av arbeiðsplássinum

**Marner Jacobsen, stjóri í Eik Banka, varð í 2006 valdur Ársins Leiðari á Leiðaradegnum hjá Synergi. Hann var glaður fyri viðurkenningina, sum hann sendi víðari til starvsfólkini í bankanum**

ÁRSINS LEIÐARADAGUR
*Leif Láadal*

Eik Banki er ein av teimum fyritøkum, sum hevur brúkt heiðurin "Ársins Leiðari" aktivt í marknaðarføringini av bankanum, eins og heiðurin Ársins Virki, sum Eik Banki eisini er kjósin, hevur verið brúktur í hesum høpi.

Tá Marner Jacobsen fekk heiðurin "Ársins Leiðari" fyri tveimum árum síðani, var tað ein góð kensla, minnist hann.

– Tað var væl fyrst og fremst eitt herðaklapp, men ein slíkur heiður kann eisini brúkast til okkurt meira ítøkiligt, sigur Marner Jacobsen og vísir á, at bankin hevur brúkt hann í sínari marknaðarførslu, eins og mann ikki skal undirmeta týdningin slíkur heiður kann hava fyri starvsfólkini.

– Tað er væl út frá einum samlaðum arbeiðsinnsatsi hjá øllum í bankanum, at mann fær eina viðurkenning av hesum slagi, og eg haldi tískil at okkara starvsfólk kunnu kenna seg errin av sínum arbeiðsplássi, sigur hann og leggur afturat:

– Tað er sera týdningarmikið, at starvsfólkini trívast, og kenslan av at vera partur av einum toymi, sum klárar tað væl, fær fólk at trívast betri.

### Stór avbjóðing

Nú búskaparligu tíðirnar eru væl øðrvísi enn fyri tveimum árum síðani, er arbeiðið hjá einum stjóra ella leiðara eisini eitt sindur øðrvísi, metir Marner Jacobsen.

– Grundleggjandi snýr leiðsla seg um tað sama í góðum og ringum tíðum, men avbjóðingarnar eru størri, tá tíðirnar eru verri, sigur stjórin í Eik Banka.

– Men harafturat kann sigast, at tað bæði kann vera læruríkt og í summum førum áhugavert, tá tíðirnar broytast, leggur hann afturat.



*Marner Jacobsen, stjóri í Eik Banka, varð í 2006 valdur til Ársins Leiðara á Leiðaradegnum.*

**FAKTA**

**Grundgevingar fyri at velja Marner Jacobsen til Ársins leiðari 2006:**
Hann er málrættaður, framsíggin og stuðlar nýhugsan. Hevur staðið á odda fyri at nútímansgjørt Føroya Sparikassa og er innovativur og hevur megnað at fara út um landoddarnar við bankavirkseminum.

# Taldi væl á image-kontoini hjá Atlantsflog

**Magni Arge, stjóri hjá Atlantsflogi, minnist serliga, at hann var glaður fyri heiðurin "Ársins Leiðari 2005" vegna øll starvsfólkini. Og so taldi tað eisini eitt sindur á "image-kontoini", sum hann sigur**

ÁRSINS LEIÐARADAGUR
*Leif Láadal*

Fyrstu ferð Synergi skipaði fyri Leiðaradegi, var í 2005. Eftir øll tey fakligu innleggini, skuldi Ársins Leiðari kjósast fyri fyrstu ferð, og valið fall á Magna Arge, stjóra í Atlantsflogi.

Hvussu minnist hann hendan dagin?

– Ivaleyst er onkur, sum heldur meg verða somikið innbilskan, at tað ikki kom óvart á meg at verða valdur ársins leiðari, men satt at siga, so gjørdist eg rættiliga bilsin. Tá var kjósingin skipað soleiðis, at luttakarar á Leiðaradegnum valdu millum nøkur evnir í uppskoti. Tað kennist sjálvsagt væl, at onnur í leiðandi størvum virða títt arbeiði og avrik. Men eg vil fegin undirstrika við feitum, at einhvør viðurkenning til mín sum leiðara er í veruleikanum ein viðurkenning av tí samlaða liði, sum fremur avrikini í fyritøkuni, ið eg arbeiði fyri. Og tað gongur líka frá teimum tímaløntu parttíðarsettu til leiðarar og nevnd.

### Ófyrireikaður

Magni Arge sigur, at hann ikki var fyrireikaður til heiðurin, og visti tí heldur ikki hvat skuldu brúka hann til.

– Hugsi tað taldi á image-kontuni hjá fyritøkuni, og tað er altíð gott. Men tað er væl sum í ítrótti: Tað eru úrslitini sum geva pokalar, og ikki umvent, sigur Magni Arge í dag.

Men hvussu er so at vera leiðari í dag, nú tíðirnar eru væl øðrvísi í mun til tá Magni Arge bleiv valdur ársins leiðari?

– At hava verið ígjøgnum byltingarnar í 90'unum er ivaleyst ein størri fyrimunir enn at hava vunnið pokalar. Nú ræður um at trimma og laga virksemið til, so fyritøkurnar klára at sigla millum brotasjógvarnar. Tað kann gerast ein spurningur um at yvirliva, men tað er eisini ein spurningur um at síggja møguleikarnar í broyttu umstøðunum, sigur Magni Arge.



*Mr. Atlantsflog, Magni Arge, var tann fyrsti, sum fekk heiðurin "Ársins leiðari". Tað var í 2005*

**FAKTA**

**Grundgevingar fyri at velja Magna Arge til Ársins leiðari 2005:**
Hevur ment Atlantic Airways sum fáur. Hevur gingið á odda og funnið nýggjar marknaðir uttanlands. Hevur ein opnan og nútímans leiðsluhátt.